## Venjaraskeið útsett

Boðast skal frá, at B2 venjaraskeiðið, sum eftir ætlan skuldi verða í døgunum 2.-4. november og 16.-18. november 2007, er útsett.
B2 venjaraskeiðið verður ístaðin tann 16.-18. november og 23.-25. november 2007.



# Kvinnulandsliðið til kapping í Litavia

**Í dag 31. oktobur fer kvinnulandsliðið til Litava at luttaka í eini sokallaðari mini kapping sum UEFA skipar fyri. Hetta er ein av fýra bólkum, í eini vinarkapping, sum UEFA skipar fyri tey lond, sum ikki vunnu seg víðari til bólkaspælið í seinastu undankapping**

FÓTBÓLTUR
*Niels Petersen*
*niels@sosialurin.fo*

Liðið, ið fer avstað er ungt. Miðalaldurin er 22 ár. Tær yngstu eru Rósa Magnussen og Olga Kristina Hansen, og eru tær 17 ára gamlar, meðan Bára Skaale Klakstein er aldursforseti við 34 árum.

Hóast ungar, so hava allar roynt landsliðsfótbólt áður. Nakrar við U19 og fleiri við A-landsliðinum, bæði til Oyggjaleikir og altjóða skrásettar dystir. Tilamans 49 altjóða skrásettar dystir og 68 Oyggjaleikadystir og 84 U19 landsdystir hava hesar 17 kvinnurnar leikt.

Í sínum 6 altjóða skrásettu dystum hevur Rannvá Andreasen skotið 7 mál. Vivian Bjartalíð hevur eisini flott hagtøl - 2 mál í 2 dystum.

Sólvá Joensen, ið leikar við Skjold BK í bestu donsku deildini hevur metið, við 10 altjóða skrásettum dystum, er ikki við hesaferð, og hevur Bára Skaale Klakkstein við 8 dystum møguleika at takað metið hjá Sólvu.



*Føroyar í dysti móti Bermuda á Oyggjaleikunum á Rhodos*

## FAKTA

**Dystarskrá**:

| Dagur: | Tíð | Dystur | Leikvøllur |
|---|---|---|---|
| Fríggjadagin 2. novembur: | 11.00 | Estland – Letland | Telšiai |
| | 4.30 | Litava – Føroyar | Šiauliai |
| Sunnudagin 4. novembur: | 11.00 | Føroyar – Estland | Telšiai |
| | 14.30 | Litava – Letland | Šiauliai |
| Mikudagin 7. novembur: | 13.00 | Estland – Litava | Šiauliai |
| | 13.00 | Letland – Føroyar | Panevėžys |

## Dystir um vikuskiftið

### Hondbóltur

**Sunset-kappingin**

| Dagur | kl. | Dystur |
|---|---|---|
| 04.11 | 14.30 | VÍF-Stjørnan |
| 04.11 | 14.30 | Kyndil-VB |

**Atlantic Airways-kappingin**

| Dagur | kl. | Dystur |
|---|---|---|
| 04.11 | 16.00 | VÍF-H71 |
| 04.11 | 16.00 | Kyndil-KÍF |

### Flogbóltur

**Meistaradeild kvinnur**

| Dagur | kl. | Dystur |
|---|---|---|
| 04.11 | 14.00 | Fleyr-Dráttur |
| 04.11 | 14.00 | Mjølnir-KÍF |
| 04.11 | 15.00 | TB-ÍF |

**Meistaradeild menn**

| Dagur | kl. | Dystur |
|---|---|---|
| 03.11 | 16.00 | ÍF-Fleyr |
| 03.11 | 16.00 | SÍ-Mjølnir |
| 04.11 | 16.00 | Mjølnir-ÍF |

## Hagtøl yvir A-landsliðið hjá kvinnum

| Nr. | Navn | Felag | Aldur | Landsdystir/mál |
|---|---|---|---|---|
| 1 | Heidi á Lakjuni | B36 | 19 | 0 |
| 2 | Annelisa Justesen | ÍF/Føroyar | 25 | 14 |
| 3 | Hellen Haraldsen | AB | 18 | 4 |
| 4 | Rúna Højgaard | B36 | 18 | 6 |
| 5 | Rósa Magnussen | GÍ | 17 | 5 |
| 6 | Bjørg B. Syderbø | AB | 19 | 5 |
| 7 | Ragna Pataway | KÍ | 26 | 15 |
| 8 | Malena Josephsen | KÍ | 30 | 18/17 |
| 9 | Rannvá B. Andreassen | KÍ | 26 | 24/32 |
| 10 | Olga Kristina Hansen | KÍ | 17 | 9/1 |
| 11 | Heidi Seydal | B36 | 18 | 12/4 |
| 12 | Jacoba Langgaard | GÍ | 19 | 16/4 |
| 13 | Vivian Bjartalíð | KÍ | 28 | 10/7 |
| 14 | Mary Ann Isaksen | GÍ | 21 | 11/1 |
| 15 | Doris í Garði Joensen | KÍ | 21 | 7 |
| 16 | Randi S. Wardum | KÍ | 20 | 20/-10 |
| 17 | Bára S. Klakstein | KÍ | 34 | 21 |